Uttanríkis- og mentamálaráðið

Dagfesting:	19. januar 2021
Mál nr.:	21/00036
Málsviðgjørt:	TH/OYS
Eftirkannað:	17. februar 2021

Uppskot til

Løgtingslóg
um
KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at fremja KT-heildarætlanina fyri undirvísingarverkið.
Stk. 2. Útreiðslurnar til at fremja KT-heildarætlanina kunnu í mesta lagi verða 40 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2027.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Seinastu 15 árini er ein røð av ymiskum KT-skipanum ment til lestrarfyrisiting. Dømi um slíkar kt-skipanir eru Vitanet og Kervi í fólkaskúlanum, Smedemarksskipanin í ymiskum útgávum í Suðuroy, Klaksvík, Vestmanna og á Kambsdali, Tímaglasið á Glasi og Prógvbókin á Setrinum.

Í 2019 staðfesti Undirvísingarstýrið (UVS) saman við leiðslunum á skúlum og útbúgvingarstovnum ein átrokandi tørv á nýggjum og betri kt-skipanum, og at støðan á fleiri økjum er alsamt meira hættislig.
Mest álvarsamt er, at skipanirnar ikki liva upp til verandi krøv um KT-trygd og persónsdátuvernd.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur saman við Undirvísingarstýrinum og Námi staðið á odda fyri eini tilgongd um strategi, har eitt verkætlanartoymi frá september 2019 til august 2020 hevur gjørt forkanningar í Føroyum og kannað støðuna í Norðurlondum.
Forkanningarnar staðfestu:

- At eingin av verandi KT-skipanum lýkur krøvini til KT-trygd og verju av persónsupplýsingum. KT-skipanir krevja longu nú dagføringar, sum hvør sær eru kostnaðarmiklar.
- Skúlaleiðslur, myndugleikar og politiska skipanin fáa ikki álítandi hagtøl, ið eru ein fyritreyt fyri ráðlegging, umsiting og menning.
- Somu dátur verða skrásettar fleiri ferðir; upplýsingar eru ofta truplar at fáa fatur á og verða manuelt skiftar millum skúla og myndugleikar.
- Dupultskrásetingin hevur við sær feilir í málsviðgerðini, ger eftirlit hjá myndugleikum tungt og elvir til óneyðugar útreiðslur
- Ónýttir menningarmøguleikar liggja í at samskipa alt KT-virksemið í undirvísingarverkinum: at keypa telduútgerð og KT-skipanir í felag, at skipa fyri felags rakstri og support og í felag at gagnnýta tvørtur um stovnsmørk teir góðu KT-førleikarnar, sum longu eru í undirvísingargeiranum.

Úrslitið av tilgongdini er ein KT-heildarætlan fyri skúlaverkið. Hendan heildarætlan varð handað landsstýrismanninum tann 4. september 2020.

Strategiin, ið er orðað, fevnir um trygd og verju av persónsupplýsingum, trygt KT-undirstøðukervi, rakstur og support, og menning av einari lestrarfyrisitingarskipan (LFS), ið er felags fyri Fróðskaparsetur Føroya, miðnámskúlaøkið, yrkisútbúgvingarøkið, maritima útbúgvingarøkið og fólkaskúlan.

Strategiska kósin er, at vit frameftir í nógv størri mun enn áður skulu verða felags um at menna, seta í verk og reka allar týðandi KT-loysnir í undirvísingarverkinum.
Vit skulu vera felags um:

- Menning av KT-skipanum og hava felags stamdátur og felags standardar fyri grundskráir og dátasamskifti.
- KT-pallar og portalar fyri leiðslukunning og hagtøl.
- KT-undirstøðukervið, KT-rakstur, hýsing, support og keyp av útgerð, lisensum v.m.

- KT-trygdarpolitikkir og KT-skipanir
- Leiðslu-, organisatións- og førleikamenning.

Heildarætlan er gjørd saman við øllum týðandi áhugapørtum, og breið undirtøka er fyri tilmælunum. (Sí skjal 1: Heildarætlan fyri undirvísingarverkið 2021-2024)

1.2. Galdandi lóggáva

Talan er um verklagslóg, ið heimiðlar landsstýrismanninum at fremja ávísa verkætlan, og tískil er ikki onnur lóggáva, ið er galdandi fyri sama økið.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Yvirskipaða endamálið við uppskotinum er at fáa til vegar materiella heimild til at nýta ta játtan, ið Løgtingið hevur latið til menningina av KT-heildarætlanini. Endamálið við ætlanini er lýst niðanfyri og í frágreiðingini "*Saman um eina trygga KT-loysn*," ið Undirvísingarstýrið hevur latið gera.

Endamálið við heildarætlanini er, at:

- Økja um KT- og dátutrygdina í undirvísingargeiranum.
- Økja um dygdina í upplýsingum um næmingar og lærugreinar (dátarikin skúlamenning).
- Veita skjótt og álítandi avgerðargrundarlag fyri politikk- og sektormenning.
- Betra um samskiftismøguleikar millum skúla, fakfólk, næmingar og foreldur.
- Beina burtur dupultarbeiði í fyrisitingini á skúlum, hjá myndugleikum og hjá næmingum.
- Skapa fyritreytir fyri munadyggum eftirlits- og myndugleikaarbeiði.

Fyri at røkka endamálum, skulu tvey høvuðsátøk fremjast

1. Stovna "Skúlanet", sum er ein felags rakstrar- og supportorganisatión, ið mennir og rekur eitt vælvirkandi og trygt KT-net fyri alt undirvísingarverkið, svarandi til tað, sum Landsnet er fyri landsstovnarnar. Skúlanet er ein KT-felagsskapur umboðandi Undirvísingarstýrið, Nám, kommunurnar, fólkaskúlan, miðnám, yrkisnám, Fróðskaparsetur Føroya og KT Landsins. Størsti parturin av uppgávunum verður útveittur til føroysku KT-vinnuna.

2. At menna eina framkomna og trygga lestrarfyrisitingarskipan, sum er felags fyri fólkaskúlar, miðnám, yrkisnám og Fróðskaparsetur Føroya. Lestrarfyrisitingarskipanin veitir talgilda skúlaumsiting, felags lærupallar og tíðarhóskandi talgilt samskifti millum skúla, næming og heim.

Týðandi fyritreyt er samstarv við Talgildu Føroyar og KT Landsins

Heildarætlanin er gjørd í samstarvi við Talgildu Føroyar og KT Landsins, sum hava verið umboðað í stýrisbólkinum og í arbeiðsbólkum.

Formligar avtalur verða gjørdar við KT Landsins um menning, rakstur og support av Skúlaneti og við Talgildu Føroyar um at gagnnýta og menna førleikar og undirstøðukervið og teir tøkniligu pallar og hentleikar, sum júst eru verksettir. Hetta snýr seg millum annað um sjálvvirkandi dátudeiling millum skúlar og myndugleikar umvegis *Heldina* og sjálvgreiðsluloysnir umvegis *Vangan og Talgilda samleikan* og gagnnýtslu av *grunddátum*. Samstarvið fer at spara tíð, orku og pening og fer at minka um teir vælkendu váðar, sum eru í slíkari fjøltáttaðari verkætlan.

Um úrtøku og nyttu av heildarætlanini fyri samfelagið og undirvísingarverkið
Samfelagsnyttan, sum er av talgilding, er spard orka, betri og bíligari tænastur, ein styrkt KT-vinna, hægri KT- og dátutrygd, gjøgnumskygni í umsitingini og rættartrygd fyri borgaran. Heildarætlanin fyri undirvísingarverkið er yvirskipað ein tilgongd, har KT-avbjóðingarnar verða loystar í felagsskapum og við felags loysnum. Talan verður um grundleggjandi umskipan við *felags* rakstri, support, keypi, menning, førleikamenning, verkseting, viðlíkahaldi og víðarimenning.

Hetta fer at geva stórrakstrarfyrimunir og synergi, og verður grundarlag fyri, at undirvísingar-stovnar og myndugleikar fáa atgongd til førleikar og tænastur á einum heilt øðrum støði enn í dag, og er ein avgerandi fyritreyt fyri at kunna liva upp til galdandi reglur um KT-trygd og verju av persónsupplýsingum.

Talgildingin fer at gera gerandisdagin lættari hjá næmingum, foreldrum og starvsfólkum á undirvísingarstovnum og hjá teimum myndugleikum, sum varða av. Ítøkilig dømi eru:


Børn, ung og foreldur:
- Betri og tryggari samskifti við skúla, fakfólk, og onnur.
- Atgongd til felags pallar (læring, samskifti og fyrisiting).

Leiðslur, lærarar og fyrisiting:
- Dagførdar og tøkar dátur um uppmøting, skrivlig avrik og fráfall.
- Spard orka og peningur til menning, innkeyp, support og hýsing.
- Minni dupultarbeiði í fyrisitingini í skúlunum og hjá avvarðandi myndugleikum.
- Lættari og tryggari samskipan og samskifti við flokkin.
- KT-vegleiðarar (lærarar), ið hava betri stundir at hugsavna seg um sínar høvuðsuppgávur (KT-nýtsla, venjing, KT-pedagogisk menning), ístaðin fyri eitt nú support og at standa fyri at keypa KT-skipanir og aðra KT-útgerð.

Eftirlit, trygd og dátuvernd:
- Økt KT-trygd og dátuvernd á øllum økjum.
- Ikki eins tengt at ávísum persónum.
- Grundarlag fyri skynsamari eftirliti og arbeiði hjá myndugleikunum.

Politikkur- og skúlamenning:
- Størri góðska í kunningini um næmingar og fak (dátustýrd skúlamenning).
- Betri grundarlag fyri politiskum avgerðum og fyri at menna geiran sum heild á upplýstum grundarlagi.

Ein verkætlanarskipað strategisk KT eind stendur á odda og samskipar
Ein strategisk KT-eind verður skipað í Undirvísingarstýrinum, sum fær ábyrgd av at samskipa menning, verkseting, rakstur og support. Eindin verður mannað við einum deildarleiðara (verkætlanarstjóra) og trimum fakábyrgdarum (verkætlanarleiðarum) fyri ávikavist LFS, Skúlanet og útbúgvingardáta.



Mynd: Leiklutir, ábyrgd og átøk verða samskipað og raðfest í samstarvi við áhugapartarnar í undirvísingarverkinum, sum verða umboðað í stýrisbólki, ráðgevandi leiðsluforum, tílvísingarbólkum ella sum limir í arbeiðsbólkum innan tey ymisku økini.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Heildarætlanin fyri KT-umsiting í undirvísingarverkinum 2021-2024 fevnir um tvey høvuðsátøk, sum eru:

1. At stovna "Skúlanet", sum er ein *felags* rakstrar- og tænastuveitingardepil, ið mennir og rekur eitt vælvirkandi og trygt KT-net fyri alt undirvísingarverkið, svarandi til tað, sum Landsnet er fyri landsstovnarnar.

2. At menna eina framkomna og trygga lestrarfyrisitingarliga KT-skipan, sum er *felags* fyri fólkaskúlar, miðnáms- og yrkisskúlar, maritimar skúlar og Fróðskaparsetur Føroya.

Eingin av verandi KT-skipanum lúka krøvini til KT-trygd og dátuvernd, og fleiri KT-skipanir krevja longu nú dagføringar, sum hvør sær eru kostnaðarmiklar.

Skúlaleiðslur, myndugleikar og politiska skipanin fáa ikki álítandi hagtøl, ið eru ein fyritreyt fyri umsiting, tilrættislegging og menning. Ónýttir møguleikar liggja í at samskipa KT-virksemið í undirvísingarverkinum, ið kunnu geva eitt munandi hægri tænastustig, stórrakstarfyrimunir og samvirkan, øllum undirvísingarverkinum til gagns.

Heildarætlanin er á fíggjarlógini fyri 2021 og er í løgukarminum fyri komandi árini. Ein verkætlanarskipað strategisk KT-eind verður sett á stovn í Undirvísingarstýrinum, og fer hon at standa á odda fyri at samskipa, menna og seta í verk átøkini í hesi heildarætlan.

Avtalur eru gjørdar við KT-Landsins um Skúlanet og við Talgildu Føroyar um samstarv. Hetta samstarvið fer at spara tíð, orku og pening, og fer eisini at minka um váðar.
Málið er, at Skúlanet og nýggja lestrarfyrisitingarliga KT-skipanin er sett í verk í øllum undirvísingarverkinum í 2025, og at rakstur, viðlíkahald og víðarimenning verður fíggjað innan verandi játtanarkarm.

Almennir stovnar hava saman við føroysku KT-vinnuni ment tryggar og vælvirkandi KT-skipanir fyri borgaran. Dømi eru Skattaskipanin, Búskaparskipan Landsins, Talgilda heilsuskipanin, Útgjaldskipanin í almannaverkinum, Talgildi Samleikin og Vangin, sum nú er settur í verk.

Nú er átrokandi tørvur á at seta sjóneykuna á undirvísingarverkið, sum hevur brúk fyri grundleggjandi endurnýggjan og umskipan av KT-virkseminum, sum fer at gagna samfelagnum og øllum, sum hava tilknýti til undirvísingarverkið.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið varð sent beinleiðis til:

Stjórnarráðini
Gjaldstovuna
Undirvísingarstýrið
Nám
Yrkisdepilin
Dátueftirlitið
Sjóvinnustýrið
Fróðskaparsetur Føroya
Vinnuhúsið
Føroya Lærarafelag
Yrkisfelagið Miðnám
Akademikarafelag Føroya
Føroya Tekniska Lærarafelag
Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Talgildu Føroyar

Av misgáum varð uppskotið ikki sent beinleiðis til Kommunufelagið soleiðis sum ætlað. Tá ráðið varnaðist mistakið setti ráðið seg í samband við Kommunufelagið. Avtalað varð, at Kommunufelagið fekk longda hoyringarfreist.

Løgmansskrivstovan, **Heilsumálaráðið, Nám, Akademikarafelag Føroya, Føroya Tekniska Lærarafelag**, **Gjaldstovan**, **Fróðskaparsetur Føroya**, **Talgildu Føroyar** og **Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya** svaraðu ikki.

Fíggjarmálaráðið hevði málsligar viðmerkingar. **Almannamálaráðið**, **Fiskimálaráðið**, **Umhvørvis- og vinnumálaráðið** og **Sjóvinnustýrið** høvdu ongar viðmerkingar.

Undirvísingarstýrið fegnast um, at lógaruppskot til verklagslóg nú verður lagt fram. Tað hevur stóran týdning, at arbeiðið av álvara kann byrja skjótast tilber.

Fíggjarkarmurin, hvussu íløgan vera deild yvir ár, er ikki partur av verklagslógini, men er ásett í fíggjarlógini og langtíðar løgukarminum. Lógaruppskotið hevur viðmerkingar ið samsvara við fíggjarlógina fyri 2021 og løgukarmin.

Undirvísingarsstýrið vil vísa á, at rættast var, um fíggingin til verkætlanina var frá 2021 til 2024, soleiðis sum heildarætlanin eisini mælir til og ikki frá 2021 til 2025, soleiðis sum fíggjarkarmurin ásetir, og viðmerkingarnar til lógaruppskotið siga. Tað eru serliga tvinnar orsøkir til hetta.

1) Verandi skipanir lúka ikki galdandi trygdarkrøv, og óvissa er um, hvussu leingi raksturin av summum av hesum skipanum kann halda fram. Tað hevur skund at fáa eina nýggja skipan verksetta.
2) Tess longri tíðarskeiðið er, har menningin av eini nýggjari skipan fer fram, tess longur skulu vit hava fleiri skipanir í rakstri. Hetta kann skapa ørkymlan fyri brúkarar, tí fleiri skipanir skulu vera í brúki samstundis í longri tíð, og raksturin verður dýrari.

Undirvísingarstýrið mælir til, at tann lagdi fíggjarkarmurin verður endurskoðaður í samsvari við heildarætlanina, ið var handað landsstýrismanninum 4. september 2020.

Uttanríkis- og mentamálaráðið viðmerkir, at hóast tað hevði verið ynskiligt, at fíggingarleisturin varð soleiðis, sum Undirvísingarstýrið eftirlýsir, so hevur man valt fíggingarleistin, og tískil má verkætlanin verða sambært tí leisti, ið man hevur valt.

Yrkisdepilin viðmerkir, at yrkisútbúgvingarøkið og yrkisnám verður nevnt fleiri ferðir í kapitli 1.

Yrkisdepilin heldur, at um her ikki einans meinast við skúlapartin av einari yrkisútbúgving, men eisini lærupartin, ið verður umsitin av Yrkisdeplinum, so er umráðandi, at Yrkisdepilin er aktivur partur av verkætlanini.

Nógv fólk nema sær yrkisútbúgving ígjøgnum lærlingaskipanina.

Læruplássgóðkenningar, ið Yrkisdepilin umsitur, eru fortreytin fyri, at lærupláss kunnu veita sín lut í yrkisútbúgvingum/yrkisnámi.

Yvir 1300 lærlingar høvdu ein aktivan lærusáttmála okkurt tíðarskeið í 2020. Umleið 40% av øllum lærlingum koma ongantíð í samband við føroyskar skúlar ígjøgnum eina yrkisútbúgving, tí skúlagongdin verður tikin í Danmark. Er ynski um, at yrkisútbúgvingarnar skulu takast við í hesa verkætlanina og ikki einans føroyski skúlaparturin av einari yrkisútbúgving, so er umráðandi, at Yrkisdepilin er við í sjálvari tilgongdini at menna skipanina og ikki einans verður kunnaður, tá verkætlanin er komin á mál.

Arbeiðsmarknaðarpartarnir hava ábyrgd av yrkisútbúgvingarøkinum saman við landsstýrismanninum. Leikluturin hjá arbeiðsmarknaðarpørtunum verður umsitin av Yrkisdeplinum. Heitt verður tí á UMMR um at Yrkisdepilin, saman við hinum pørtunum innan skúlaverkið, verður tikin við í stýrisbólkin fyri verkætlanina.

Uttanríkis- og mentamálaráðið viðmerkir, at skipanin, ið verður ment, er umsitingarskipan til føroysku skúlarnar og harvið eisini lærlingar í ganga í skúla í føroysku skúlunum. Nýggja skipanin skal avloysa skipanir, ið eru í dag, men sum mugu endurnýggjast. Møguleiki verður

at knýta aðrar skipanir at lestrarumsitingarskipanini, sum t.d. stuðulsskipanina hjá Studna og umsitingarskipan hjá Sjóvinnustýrinum. Allir lærlingar, eisini teir, sum í dag taka skúlagongd í Danmark, verða skrásettir í stuðulsskipanini hjá Studna og broytir henda nýggja skipanin ikki hesi viðurskifti. Ein týðandi táttur í verkætlanini er, at teir partar ið verða ávirkaðir av skipanini, og sum fara at brúka hana tá ið hon er liðug, eisini eru við í menningini av heildarætlanini. Yrkisdepilin er ein slíkur partur, og tí er tað sjálvandi umráðandi at Yrkisdepilin er partur av verkætlanini. Ein háttur kundi verði, at Yrkisdepilin er partur av stýrisbólkinum.

Yrkisfelagið Miðnám viðmerkir:

- Tað má vera greitt, at talan er um eina framskygda skipan til undirvísing, pedagogik og tøkni, sum er ætlað skúlum – at hon fer at rigga á skúlunum frá byrjan.
- Skeið og upplæring fyri tey, ið skulu brúka skipanina er alneyðug – játtan til hetta má fylgja við.
- Verandi KT vegleiðarar mugu ikki missa størv, men mugu vera við í prosessini at byggja hetta upp, og framhaldandi vera við til at viðlíkahalda og menna didaktiska kt-umhvørvið á skúlunum.
- Verandi lokal KT tænasta má varðveitast, soleiðis at tann tænasta og hjálp, sum starvsfólk á skúlunum óvæntað hava brúk fyri, verður verandi á lokalu skúlunum, tí hetta er tænasta, sum dagligur tørvur er á, og sum aloftast skal loysast beinanvegin.

Uttanríkis- og mentamálaráðið viðmerkir, at neyðugt er at skilja ímillum menning av eini fakskipan, sum verklagslógin snýr seg um, og møguligar aðrar ávirkanir, ið umskipan av infrakervinum á skúlunum kann hava við sær. Menningin av eini lestrarfyrisitingarligari skipan hevur ikki beinleiðis ávirkan á starvsfólkabólkar. Skipan av infrakervinum – Skúlanet – kann fáa ávirkan á arbeiðsuppgávur, ávísir starvsfólkabólkar hava í dag. Verklagslógin snýr seg tó ikki um henda partin av heildarætlanini.

Tá nýggjar telduskipanir vera settar í verk er neyðugt, at tíð og orka verður sett av til neyðuga upplæring, og verður hetta skipað í samráð við millum myndugleikan og skúlarnar.

Lærarafelagið viðmerkir, at felagið tekur undir við tí breiðu ætlanini at menna eina KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið. Felagið kennir til umstøðurnar í fólkaskúlanum og serligu avbjóðingarnar, ið eru nú í mun til KT-trygd, og vit síggja, at fólkaskúlin kann fáa fyrimunir av at vera við í heildarætlanini, fyri at lyfta tær uppgávur, ið liggja fyri framman. Við hesum í huga vilja vit koma við nøkrum viðmerkingum til "Almennu viðmerkingarnar" til lógaruppskotið um KT-heildarloysnina fyri undirvísingarverkið sæð í mun til fólkaskúlan.

Sum vit skilja á lagnum, so hevur tað bráðskund at dagføra KT-skipanina í pørtum á undirvísingarverkinum; hetta er ikki støðan í fólkaskúlanum, sjálvt um ábøtur eru tiltrongdar. Men nú hendan stóra heildarætlanin verður framd, eigur fólkaskúlin at hugsast inn í KT-heildarloysnina fyri tað samlaða undirvísingarverkið.

Krøvini til KT-búnaðin økjast í tráð við vaksandi KT-nýtslu í skúlanum hjá næmingum, lærarum og leiðslum, og avbjóðingin at møta krøvunum um KT-trygd er stór og samansett, bæði í mun til trygga nýtslu av KT, hvussu dátur ferðast trygt á netinum í skúlaverkinum, og hvussu talgildar upplýsingar um næmingar og lærarar verða goymdar og handfarnar í fólkaskúlunum.

Í viðmerkingunum verður eisini víst á álvaran í, at KT-skipanirnar í undirvísingarverkinum, harímillum KT-skipanir í fólkaskúlanum, ikki liva upp til verandi krøv um KT-trygd og persónsdátuvernd. Hetta má takast í álvara, og felagið tekur undir við, at ein heildarloysn verður ment at møta hesi avbjóðing fyri alt undirvísingarverkið, tí at hetta eru ov tungar uppgávur at loysa hjá hvørjum stovni ella skúla sær.

Tað, sum uppskotið snýr seg um, er, at geva landsstýrismanninum heimild til tann fíggjarliga partin. Víst verður á, at væntaði kostnaðurin fyri KT-heildarætlanina er 89,5 mió., og uppskotið skal heimila landsstýrismanninum at nýta 40 mió. til KT-heildarætlanina. Írestandi fíggingin, ið er størra helvtin av kostnaðinum, kann fíggjast sum rakstur av verandi KT-virksemi í undirvísingarverkinum, og er tískil ikki partur av uppskotinum. Í mun til fólkaskúlan vilja vit gera vart við, at tað er ikki rætt at rokna við at finna fígging til partar av KT-heildarætlanini í verandi játtan til fólkaskúlan.

Fólkaskúlanum manglar pening sum er, peningur er ikki til m.a. víðkaða tvílæraraskipan og at víðka sertilboð. Afturat hesum er eitt stórt eftirsleip, tá tað kemur til at víðari- og serútbúgva lærarar, m.a. sum KT-vørðir og bókavørðir.

Víst verður á í viðmerkingunum, at tá KT-heildarætlanin er ment í 2025, so kann rakstur, viðlíkahald og víðarimenning verða fíggjað innan verandi játtanarkarm við umraðfesting og umskipan á grein 7 í fíggjarlógini. Hendan møguleikan síggja vit ikki fyri okkum í fólkaskúlanum. Fólkaskúlin stendur fyri eini øktari nýtslu av KT. Næmingar fara at nýta KT meira í teirra arbeiði, lærarar fara at nýta KT meira í undirvísingini, og skúlaleiðslur fáa fleiri uppgávur, ið skulu loysast við talgildum loysnum. Hesin vøkstur í KT-nýtslu í fólkaskúlanum skal so aftur liva upp til krøvini um KT-trygd. Hetta er nýtt virksemi í fólkaskúlanum, sum kemur afturat øllum tí virksemi, sum longu er. Tá talan er um eina víðkan av virkseminum í fólkaskúlanum, í hesum føri í mun til KT-nýtslu og KT-trygd, so má tað føra til eina hægri játtan til fólkaskúlan.

Røktini av KT í fólkaskúlanum taka KT-vørðir sær av. KT-vørðir eru lærarar, sum hava nomið sær serligan KT-førleika. Tað er ein fyrimunur og styrki í verandi skipan, at tað eru lærarar á skúlanum, sum gera tilmæli og taka avgerðir í teirra skúla, tí at tey kenna sín skúla best, og við ráðgeving hava skúlarnir keypt inn til júst teirra tørv. Hetta er ein avgerðarheimild, ið vit meta, at skúlarnir eiga at hava frameftir eisini, so at hvør skúli kann fáa bestu umstøður til sín serstaka tørv.

KT-vørðurin er krummtappurin í KT í fólkaskúlunum, og tað eigur hann eisini framhaldandi at vera. Játtaða arbeiðstíðin í fólkaskúlanum til arbeiðið hjá KT vørðinum er lítil í mun til allar uppgávurnar, ið hann hevur ábyrgd av. Í fólkaskúlunum samanlagt eru gott 13 ársverk játtað til at ambæta øllum um 7.000 næmingunum og 1000 lærarum og øðrum starvsfólkum í teimum 41 fólkaskúlunum, og tað er ein sera bílig skipan.

Arbeiðsuppgávurnar hjá KT-vørðinum eru nógvar, m.a. at røkja tøknina í skúlanum, ráðgeva um keyp av KT, undirvísa næmingum og lærarum og vegleiða. Tá arbeiðstíðin er avmarkað, so mugu uppgávurnar raðfestast. Fyrsta treyt er, at KT-búnaðurin riggar, og tí verður røktin mangan tikin framum, so at uppgávur sum at ráðgeva, vegleiða og undirvísa næmingum og lærarum mangan liggur á láni.

Tað er ikki ráðiligt at taka frá KT-vørðinum til at fíggja hesa heildarloysn. KT-heildarloysnin kann tó stuðla KT-vørðinum og taka uppgávur av hansara herðum, so at KT-vørðurin kann fáa betri tíð til at ráðgeva, vegleiða og undirvísa næmingum og lærarum á sínum skúla. Fólkaskúlin stendur fyri nýggjum og øktum krøvum um KT-trygd og dátuvernd á øllum økjum, og tað er einstaki skúlaleiðarin, ið stendur við endan. At tryggja økta KT-trygd krevur tíð, vitan og orku. Leiðarar hava ikki tíðina til taks at fáa journalført øll skjøl og arbeiða eftir teimum mannagongdum, KT-trygdin krevur. Leiðslutíðin í fólkaskúlanum má upprøðfestast, skulu leiðslurnar hava hóskandi tíð at gera hetta arbeiðið til lítar. At noyða leiðslur at niðurraðfesta annað leiðsluvirksemi, fyri at fáa rúm til journalføring og KT-mannagongdir, vildi verið ein bjarnartænasta fyri føroyska skúlaverkið.

Eitt ynski við KT-heildarloysnini er at geva møguleikar fyri betri dátustýrdari skúlamenning, við at størri góðska fæst í kunningini um næmingar og fak. Skal størri dátustýring skipast, so má KT-skipanin fóðrast við upplýsingum. Hetta er tíðarkrevjandi arbeiði. Um ikki arbeiðstíð verður løgd afturat, til at fóðra skipanina, so er vandi fyri, at skrásetingin av tølum og næmingum tekur tíðina frá kjarnuuppgávu fólkaskúlans, nevnliga at menna næmingarnar í øllum lutum. Fremsti máti at menna næmingarnar, er at vera saman við næmingunum, og tá lærarin og skúlaleiðarin skulu brúka meira tíð við telduna, so missa tey tíð saman við næminginum.

Tað er týðiligt fyri Føroya Lærarafelag, at KT-heildarætlanin hevur við sær eitt størri krav til skúlaleiðarar og lærarar um eitt økt talgilt skrásetingarvirksemi. Um tað er ynskið, so má fólkaskúlin eisini fáa játtaða arbeiðstíð til læraran og meira leiðslutíð til at ambæta nýggju KT-skipanini. Tað er ikki rætt, at tíðin skal takast frá børnunum, tí ein talgild skipan skal fóðrast.

At menna eina KT-heildarætlan til alt undirvísingarverkið er eitt gott átak sæð í mun til nýggj krøv til fólkaskúlan um KT-trygd og persónsdátuvernd. Men lærarar og skúlaleiðarar mugu fáa arbeiðstíð til at ambæta skipanini og upplæring at brúka skipanina. Játtanin má eisini taka hædd fyri eyka arbeiði og upplæring.

Tað er eftir okkara meting lítið sannlíkt, at hendan skipanin fer at gera gerandisdagin hjá lærarum og skúlaleiðarum lættari, og at hetta kann rúmast í verandi rakstrarjáttan fyri fólkaskúlan.

Um vit hyggja til danir, so hava teir nýliga ment skúlaplatformin Aula. Um hann sigur formaðurin í danska skúlaleiðarafelagnum, *Claus Hjortdal*, m.a. í samrøðu við *Folkeskolen:* "Da vi gik væk fra SkoleIntra og over til Aula, fik vi at vide, at der kom et tidssparende værktøj. ... Men vi har fået det modsatte."

Leinkjan niðanfyri vísir til áðurnevndu grein:
https://www.folkeskolen.dk/1863985/skolelederne-kun-syv-procent-er-glade-for-aula

Uttanríkis- og mentamálaráðið viðmerkir, at heildarætlanin snýr seg um tvey høvuðsátøk: Menna eina lestrarfyrisitingarliga kt-skipan og skipa eitt Skúlanet.

Neyðugt er at skilja ímillum menning og verkseting av eini fakskipan, sum verklagslógin snýr seg um, og møguligar aðrar ávirkanir, ið umskipan av infrakervinum á skúlunum kann hava við sær. Skipan av infrakervinum – Skúlanet – kann fáa ávirkan á arbeiðsuppgávur, ávísir starvsfólkabólkar hava í dag. Skúlanet verður skipað í samskifti við avvarðandi partar, ið eru

Uttanríkis- og mentamálaráðið, einstøku útbúgvingarstovnarnir, kommunurnar, KT Landsins, Undirvísingarstýrið, Nám og avvarðandi yirkisfeløg.

KT-felagið viðmerkir at KT-felagið tekur undir við, at Føroya landsstýri fremur eina KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið. KT-felagið fegnast um, at KT-infrakervið framhaldandi verður útbygt og er við til at effektivisera samfelagið.

Sjálvsagt hevur tað týdning, at kostnaðarmetingar verða gjørdar nágreiniliga.

Uttanríkis- og mentamálaráðið viðmerkir, at játtanin í verklagslógini, fer í størsta mun at koma føroyskari kt-vinnu tilgóðar, tá talan er um at menna loysnir, ið føroyskar kt-fyritøkur eru førar fyri at menna til neyðugu dygdina og til kappingarførar prísir. Tær kostnaðarmetingar ið higartil eru gjørdar, taka støði í upplýsingum og samskifti við føroyskar og útlendskar kt-veitarar umframt Styrelsen for IT og Læring, undir danska Børne- og Undervisiningsministeriet, ið hevur drúgvar royndir at standa á odda fyri menning av líknandi skipanum.

Dátueftirlitið viðmerkir at í pkt. 1.1. í almennu viðmerkingunum til uppskotið er greitt frá, at verandi KT-skipanir í skúlaverkinum ikki lúka krøvini til verju av persónupplýsingum, og at hetta er ein av orsøkunum til, at uppskotið verður sett fram, og at nýggj skipan skal mennast. Reglurnar um vernd av persónupplýsingum hava til endamáls at verja tann einstaka, tá persónupplýsingar um viðkomandi verða viðgjørdar. At verandi skipanir í skúlaverkinum, sum viðgera persónupplýsingar um flest allar føroyingar, undir hesum upplýsingar um børn, ikki lúka lógarásettu krøvini til verju av persónupplýsingum er álvarsamt og á ongan hátt nøktandi.

Dátueftirlitið tekur tí undir við, at nýggj skipan verður ment, sum lýkur lógarásett krøv til vernd av persónupplýsingum, samstundis sum skipanin økir um KT-trygd sum heild og hevur aðrar fyrimunir við sær. Dátueftirlitið heldur tað eisini vera sera skynsamt at gagnnýta tað undirstøðukervið og tær skipanir, sum longu eru ment í sambandi við t.d. Talgildu Føroyar, og sum lúka krøv til TK-trygd og trygd í sambandi við verju av persónupplýsingum. Dátueftirlitið skal í sambandi við heildarætlanina serliga gera vart við reglurnar §§ 38 og 49 í løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum (dátuverndarlógin).

Sambært § 38, stk. 1 um dátuvernd ígjøgnum sniðgeving skal dátuábyrgdarin seta hóskandi tøknilig og bygnaðarlig tiltøk í verk, tá tólini til viðgerð verða løgd føst, sum eru sniðgivin á ein slíkan hátt, at viðgerðin lýkur krøvini í løgtingslógini.
Í serligu viðmerkingunum til § 38, stk. 1 stendur m.a.:

> *"Ásetingin merkir, at dátuábyrgdarin í sambandi við at nýggj skipan verður umhugsað –t.e. tá tólini til viðgerð verða fastløgd – skal hugsa dátuvernd inn. […]*
> *Dátuvernd ígjøgnum sniðgeving byggir á váðagrundaða tilgongd til dátuvernd. Dátuábyrgdarin skal tí í sniðgevingini hava fyrilit fyri verandi tøkniliga støði, íverksetingarkostnaði og slagi, vavi, samanhangi og endamáli við viðgerðini, umframt váðum av skiftandi sannlíkindum og álvaran fyri rættindum og frælsisrættindum hjá persónum, sum viðgerðin hevur við sær. Dátuábyrgdarin skal sostatt í hvørjum einstøkum føri meta um váðan við viðgerðini í mun til, hvørji tiltøk eru fyri neyðini, og hvussu hetta kann sniðgevast inn í skipanir."*

Í § 49, stk. 1 um avleiðingargreining er ásett, at um eitt slag av viðgerð, serliga tá ið nýggj tøkni verður nýtt, við atliti at slagi, vavi, samanhangi og endamáli, sannlíkt hevur við sær stóran váða fyri rættindi hjá einstaklingum, skal dátuábyrgdarin undan viðgerðini gera eina greining av, hvørjar avleiðingar ætlaða viðgerðin hevur fyri dátuverndina.

Dátueftirlitið skal at enda heita á Uttanríkis- og mentamálaráðið at tryggja, at viðgerð av persónupplýsingum, sum fer fram til nýggj skipan er ment, fer fram á ein hátt, sum lýkur krøvini í dátuverndarlógini. Hetta kann verða við bæði tøkniligum og bygnaðarligum tiltøkum.

Uttanríkis- og mentamálaráðið viðmerkir, at tá farið verður undir at menna eina slíka umsitingarskipan, verður í sjálvari menningartilgongdini lagdur dentur á, at dátuvernd verður hugsað inn í sniðgevingina og at neyðugar váðametingar vera gjørdar í hesum sambandi. Ráðið fylgir gongdini og hevur egnan DPO, sum er knýttur at verkætlanini. Harumframt vera serfrøðingar í sniðgeving og váðameting knýttir at menningartilgongdini.

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag viðmerkja, at feløgini hava viðgjørt uppskotið til løgtingslóg um KT-heildarætlan fyri undivísingarverkið. Feløgini taka undir við verkætlanini. Tó eftirlýsa Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag, at vinnuligi parturin av skúlaverkinum, serliga innan lærlingaútbúgvingarnar, aktivt verður tikin upp á ráð. Tað er sera umráðandi, at lærlingaútbúgvingarnar passa inn í KT-skipanirnar eisini. Tí eigur Yrkisdepilin at vera partur av stýrisbólkinum.

Uttanríkis- og mentamálaráðið viðmerkir, at skipanin, ið verður ment, er umsitingarskipan til føroysku skúlarnar og harvið eisini lærlingar, ið ganga í skúla í føroysku skúlunum. Nýggja skipanin skal avloysa skipanir, ið eru í dag, men sum mugu endurnýggjast. Møguleiki verður at knýta aðrar skipanir at lestrarumsitingarskipanini, sum t.d. stuðulsskipanina hjá Studna og umsitingarskipanina hjá Sjóvinnustýrinum. Allir lærlingar, eisini teir, sum í dag taka skúlagongd í Danmark, verða skrásettir í stuðulsskipanini hjá Studna, og broytir henda nýggja skipanin ikki hesi viðurskifti. Ein týðandi táttur í verkætlanini, er, at teir partar ið verða ávirkaðir av skipanini, og sum fara at brúka hana, tá ið hon er liðug, eisini eru við í menningini av heildarætlanini. Yrkisdepilin er ein slíkur partur, og tí er tað sjálvandi umráðandi, at Yrkisdepilin er partur av verkætlanini. Ein háttur kundi verið, at Yrkisdepilin er partur av stýrisbólkinum.

Kommunufelagið viðmerkir, at lógaruppskotið ber heitið "Uppskot til løgtingslóg um KT-heildarætlan fyri undirvísingarverkið", umframt at § 1, stk. 1 eisini brúkar heitið "KT-heildarætlanina...". Í § 1, stk. 2. verður sagt, at útreiðslurnar til at fremja KT-heildarætlanina kunnu í mesta lagi verða 40 mió. kr.

Her tykist vera ógreiða, tí at heildarætlanin fevnir um tveir høvuðstættir, t.e. ein KT-kervispartur, nevndur Skúlanet, ið fevnir um KT-netverk/ -trygd, KT-tól og ávísar KT-skipanir, umframt trygdarviðurskifti, meðan hin parturin snýr seg um eina felags lestrarfyrisitingarliga KT- skipan, ið er ein serstøk samansett heildarskipan ella fakskipan, ið er serliga snikkað til undirvísingarverkið sum heild. Sum tað framgongur av fylgiskjalinum, so er tað tann seinna skipanin, ið verður mett at kosta 40 mió. kr., meðan netverksparturin ikki er fevndur av tí. Kommunufelagið er partur av arbeiðsbólki hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, ið viðger júst, hvussu tann parturin skal skipast, og har tað verður gjørt

við at hava 2 stig av limaskapi. Tann parturin er í høvuðsheitum fevndur av rakstrarábyrgdini hjá kommununum fyri fólkaskúlan (fólkaskúlalógini § 47, stk 4).
Kommunufelagið hevur ikki viðgjørt spurningin um kostnað fyri LFS-skipanina, men metir sum heild, at slíkar tilgongdir eru sera krevjandi, og nógv skal til fyri at koma á mál við slíkari framsóknari skipan.

Eisini skal nevnast, at Kommunufelagið og Uttanríkis- og mentamálaráðið í fjør gjørdu eina standardavtalu, sum er ein heildaravtalu um veitingar frá Námi, ið bæði fevnir um undirvísingartilfar og skipanir, ið at verða partur av eini komandi LFS-skipan.

Kommunufelagið mælir til, at lógaruppskotið verður broytt soleiðis, at tað snýr seg um LFS-skipanina burturav. Rakstrarviðurskifti fólkaskúlans eiga at verða skipað í fólkaskúlalógini, og skal Kommunufelagið vísa á, at felagið í 2019 lat hoyringarsvar viðvíkjandi tillagingum í fólkaskúlalógini, herundir tillagingum viðvíkjandi rakstrarviðurskiftum í mun til kommunurnar sum staðbundin skúlamyndugleiki.

Tað vísir seg framvegis at vera tørvur á teimum tillagingum, sum nevndar eru í hoyringarskrivinum frá januar 2019, og hesin tørvurin gerst alt meira sjónligur, tá tosað verður um KT í fólkaskúlum og ikki minst í mun til nýggju dátuverndarkrøvini.
Til seinast loyvir Kommunufelagið sær at viðmerkja, at henda KT-verkætlanin, ið er kostnaðarmikil, og sum lutfalsliga sæð tekur stóran part av landsfíggingini til íløgur í undirvísingarkrevinum, má ikki nerva raðfestingina av framhaldandi menning av undirvísingartilfari til fólkaskúlarnar.

Uttanríkis- og mentamálaráðið viðmerkir, at víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 1, har stendur:

> *"Landsstýrismaðurin fær heimild at fremja KT-heildarætlanina, ið man politiskt hevur avgjørt at raðfesta. Mesta mark er ásett til 40 mió. kr., ið er upphæddin, sum man hevur avgjørt at seta av fíggjarárini 2021-25. At "fremja" í hesum samanhangi merkir at menna og verkseta lestrarfyrisitingarkipanina og at verkseta Skúlanet, umframt tann rakstur, ið stendist av menning og verksetan í tíðarskeiðinum 2021-2025."*

Tað er tí ikki rætt, at uppskotið bert umfatar menning av lestrarfyrisitingarskipanini, men eisini verksetan av "Skúlanetia". Endamálið við heildarætlanini er bæði at menna eina lestrarfyrisitingarskipan og at skipa eitt Skúlanet, líkt tí vit í dag kenna sum "Landsnet"

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Avleiðingar fyri landið
Í heildarætlanini frá september 2020 varð mett, at samlaði kostnaðurin til leiðslu, samskipan, menning, verkseting og rakstur í tíðarskeiðnum 2021-2024 er 89 mió. kr. yvir 4 ár. Av hesum máttu 41,5 mió. kr. fáast sum nýggj játtan á løgtingsfíggjarlógini.

Á langtíðar løgukarminum, sambært fíggjarlógini fyri 2021, eru 40 mió. kr. settar av til heildarætlanina komandi fimm fíggjarárini. Verkætlanin er tillagað samsvarandi, og áramálið verður 2021-25 í staðin fyri 2021-24.

Írestandi fíggingin er longu inni í skipanini sum fígging til rakstur av verandi KT-virksemi í undirvísingarverkinum, og er tískil ikki partur av uppskotinum til verklagslóg.

Mett verður, at framhaldandi KT-rakstur, viðlíkahald og víðarmenning kann fíggjast innan verandi rakstrarjáttan við raðfesting og umskipan á grein 7 í fíggjarlógini. Talan verður sostatt ikki um eina sparing í krónum og oyrum, men um at man fær ein samlaða loysn, ið er bæði betri og tryggari enn verandi skipanir, og at man tískil sum heild fær meira gagn av somu játtan.

Meira yvirskipað, so fer KT-økið í síni heild at føra við sær øktar útreiðslur í framtíðini. Hetta stendst m.a. av krøvum til KT-trygd og krøvunum til vernd av persónsupplýsingum. Heildarætlanin tryggjar, at hesar avbjóðingar kunnu verða loystar á nøktandi hátt.

Avleiðing fyri kommunurnar
Sjálvt uppskotið hevur ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri kommunurnar. Kommunurnar hava í dag útreiðslur til KT í fólkaskúlanum, og hesar útreiðslur fara framhaldandi at vera.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Alt undirvísingarverkið fer at merkja umsitingarligar avleiðingar av verkætlanini. Skipanir vera savnaðar og sjálvvirkandi dátuflutningur, har tað ber til, millum stovnar, borgaran og starvsfólk fer at lætta munandi um arbeiðsorkuna ið er neyðug. Væntandi verða eisini færri skrásetingarfeilir, við tað at tað ikki longur verður neyðugt at skráseta somu upplýsingar fleiri ymisk støð.

Sum frá líður loysnir við sjálvavgreiðslum at geva borgarum betri innlit í egin viðurskifti og skapa effektivari loysnir fyri skúlar og stovnar.

Við hesi verkætlan fer man at fáa atgongd til hagtøl, skipað eftir altjóða leisti, ið geva neyðugt innlit og samanberingargrundarlag við onnur samfeløg

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Talan er um eina munandi upphædd, ið verður nýtt til menning av nýggjari KT-skipan og keypi av KT-útgerð og tænastunum í hesum sambandi. Ætlanin er, í so stóran mun sum gjørligt, at brúka føroyskar veitarar. Umframt tann fíggjarliga fyrimunin, ið hetta gevur føroyskum fyritøkum, so fer verkætlanin at verða við til at menna førleikarnar í føroysku KT-vinnuni.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Talgilding av tænastum letur upp fyri, at minni pappír verður brúkt í privatari- og almennari umsiting. Aðrar avleiðingar eru fleiri teldur og meira streymur til servarar og køling. Hinvegin verða færri kopimaskinur og prentarar.
Annars er talan um at menna eina KT-skipan og at skipa eitt KT-infrakervi, og hevur hetta onga beinleiðis ávirkan á umhvørvið í Føroyum.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Við LFS og Skúlaneti fáa næmingar og starvsfólk eitt einsháttað KT-tilboð uttan mun til, hvønn skúla ella hvørja kommunu tey hoyra til, og uttan mun til støddd og staðseting av skúlanum.
T.v.s. at stovnar í útjaðaranum ella á útoyggj fáa eins tænastustig, sum teir stóru og nýggjastu stovnarnar fáa í dag, sum hava egnar KT-deildir.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir annað enn, at tað sum heild fer at lætta um umsitingina av undirvísingarverkinum og fer at hækka um tænastustøðið til teir borgarar, ið so ella so eru knýttir at undirvísingarverkinum.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Grunddátaskráir verða bygdar í samsvari við altjóða flokkingarmeginreglur. Talan er um ECTS-skipanina (European Credit Transfer System), EQF-skipanina (European Qualification Framework) og ISCED-skipanina (International Standard Classification of Education).

At nýta felags flokkingarmeginreglur tryggjar greidleika og gjøgnumskygni og gevur okkum eitt væl skipað hagtalsgrundarlag um okkara útbúgvingar, sum kann samanberast beinleiðis við altjóða hagtøl.

At brúka altjóða flokkingarmeginreglur kann harumframt gerast eitt amboð til viðurkenning av útbúgvingum í Føroyum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

1) *Hoyvíkssáttmálin*

Uppskotið hvørki áleggur skyldur ella gevur rættindi til nakran borgara. Mett verður tí ikki, at Hoyvíkssáttmálin er viðkomandi fyri uppskotið.

2) Evropeiski mannarættindasáttmálin, EMRS

Uppskotið hvørki áleggur skyldur ella gevur rættindi til nakran borgara. Mett verður tí ikki, at EMRS er viðkomandi fyri uppskotið.

3) Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek

Uppskotið hvørki áleggur skyldur ella gevur rættindi til nakran borgara. Mett verður tí ikki, at sáttmálin er viðkomandi fyri uppskotið.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki við sær revsing, sekt, pantiheimild ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið áleggur ikki skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Nei

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Ja, uppskotið heimilar landsstýrismanninum at brúka 40 mió. kr. til at fremja KT-heildarætlanina.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Nei

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Nei

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið/ landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Ja	Ja	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Landsstýrismaðurin fær heimild at fremja KT-heildarætlanina, ið man politiskt hevur avgjørt at raðfesta. Mesta mark er ásett til 40 mió. kr., ið er upphæddin, sum man hevur avgjørt at seta av fíggjarárini 2021-25. At "fremja" í hesum samanhangi merkir at menna og verkseta lestrarfyrisitingarkipanina og at verkseta Skúlanet, umframt tann rakstur, ið stendist av menning og verksetan í tíðarskeiðinum 2021-2025.

Til § 2
Ásetan um gildiskomu og sólsetur.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 3. mars 2021

Jenis av Rana
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

+Fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Heildarætlan fyri Undirvísingarverkið 2021-2024
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Undirvísingarstýrinum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Lærarafelagnum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá Sjóvinnustýrinum
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Stýrinum fyri YF
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá KT-felagnum
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Yrkisdeplinum
Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Dátueftirlitinum
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 11: Hoyringarsvar frá Almannamálaráðnum
Fylgiskjal 12: Hoyringarsvar frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 13: Hoyringarsvar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag
Fylgiskjal 14: Hoyringarsvar frá Fiskimálaráðnum